


# **Lágprísir** til útlendingar




**Lomvigaegg teljast millum brellbitarnar, sum føroyingar ikki hava roynt í drúgt áramál. Men í Íslandi er framvegis nóg mikið av svartfugli, og tí kunnu leskiligu og stóru eggini njótast á nøkrum av matarstøðunum**

**Íslendska gjaldoyrakreppan hevur broytt Reykjavík til eitt kulinariskt paradís, har tað besta av tí besta fæst fyri helvtarprís**

**ÍSLAND**
**Jákup Mørk**
jakup@sosialurin.fo

Café- og matstovumentanin í Reykjavík hevur gjøgnum tey nógvu seinastu árini livað sítt vakra lív.

Sum ein rættur metropolur í Norðuratlantshavi stendur Reykjavík ikki tað allar minsta aftan fyri tað, sum aðrir europiskir stórbýir hava at bjóða innan matarlist, og fram til seinasta heyst var hetta eisini fyri ein prís, ið á leið samsvaraði við tað, sum meginlandið annars hevur at bjóða.

Gjaldoyrakreppan, sum varð avleidd av búskapar- og fíggjarkreppuni hjá grannum okkara hevur tó borið við sær, at kræsnir gómar í dag kunnu fáa sær tað besta av tí besta fyri undirprís. Fyri á leið tað, sum ein føroyskur túsundkrónuseðil er verdur, ber lættliga til hjá tveimum fólkum at nøkta bæði svongd og tosta, og lat tað bara vera sagt alt fyri eitt, at tað trýtur ikki við framúr góðum matarstøðum.

Trúgvir móti tjóðskaparkensluni eru góðir fiskarættir partur av matarskránni á einum og hvørum staði við eitt lítið sindur av virðing fyri sær sjálvum. Men kjøt av fylum, neytum og seyði er eisini at finna á flestu seðlunum, umframt at stórhvalakjøt eisini kann fáast á fleiri støðum.

Hjá vanliga íslendinginum er talan ikki á sama hátt um gourmet-upplivingar til lágprís, tí hóast krónuvirðið er farið niður í helvt, er lønin á ongan hátt farin uppeftir. Heldur tvørturímóti.

Tí eru betru matstovurnar í dag fyri tað nógva rúgvaðar við útlendskum gestum, sum í so máta vinna fyrimun av íslendsku kreppuni. Hetta tykist eisini merkja café-lívið í Reykjavík, sum ikki er heilt so pulserandi, sum tað var fyri bara góðum hálvum ári síðani. Men framvegis ber tó væl og virðiliga til at fáa sær bæði eina lætta máltíð ella eina góða øl á hópatals støðum – bæði í Miðbýnum og í stóru keypsskálunum, sum eru partur av býarmyndini í Reykjavík.



Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo